Galdandi ásetingar fyri øki D á havnalagnum:

Øki D:

a) Økið verður lagt av til havnaendamál og virki, ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey, bilstøðlar o.t.
b) Byggingarstigið fyri havnaøkið sum heild má ikki fara upp um 0,5.
c) Rúmmát av húsinum má ikki fara upp um 3 m3 fyri hvønn m2 av grundstykkinum.
d) Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu vera hægri enn 10 m yvir liðugt kajdekk (miðal við húsahornini).
e) Bygging má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 15 m ella nærri markið enn 5 m, minsti fráleiki millum bygningar 10 m.
f) Á hesum økinum er ikki loyvt at innrætta bústaðir.
g) Bygdaráðið kann tó geva loyvi til, at partur av eini bygging kann verða hægri enn teir ásettu 10 m, eitt nú tekniskur útbúnaður ella líknandi. Hetta er galdani fyri øll D økini uttan D3.
h) Økini verða løgd burturav til fergulegu og bilstøðlar.
i) Útstykking kann ikki fara fram.

Ein partur av økinum (sí viðløgd kortskjøl) verður broyttur til øki D1 við fylgjandi ásetingum:

Øki D1:

a) Økið verður lagt av til havnaendamál og virki, ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey, bilstøðlar o.t.
b) Byggistigið fyri havnaøkið sum heild má ikki fara upp um 0,5.
c) Rúmmát av húsinum má ikki fara upp um 3 m3 fyri hvønn m2 av grundstykkinum.
d) Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu vera hægri enn 10 m yvir liðugt kajdekk (miðal við húsahornini).
e) Bygging má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 8 m, ella nærri markið enn 5 m, minsti fráleiki millum bygningar 10 m.
f) Á hesum økinum er ikki loyvt at innrætta bústaðir.
g) Býráðið kann tó geva loyvi til, at partur av eini bygging kann verða hægri enn teir ásettu 10 m, eitt nú tekniskur útbúnaður ella líknandi. Hetta er galdandi fyri øll D økini uttan D3.